Vit skulu hava 15 nýggjar handlar

Kom og leiga í SMS

www.sansir.fo

Asloy Winther Johnsen, The Body Shop

“Úrvalið verður nógv størri...”

SMS verður útbygt. Hugnaligi býlingurin í Havn fer nú at hýsa 35 handlum, og tí verða 15 leigumál leys at søkja.

Vit sóknast eftir nýggjum leigumálum til klæðir, móta og persónliga røkt, so sum hárfríðkan, andlits- og kropsrøkt. Eitt størri høli er ætlað til brúkslutir til heimið og gávubúð. Og so eru tað øll tey góðu, nýskapandi hugskotini, sum vit bíða eftir.

SMS bjóðar eitt einastandandi grundarlag fyri lønandi handilslívi. Hvørja viku vitja 45.000 fólk SMS, og eftir útbyggingina vænta vit eini 70.000 fólk um vikuna.

Ein nýggjur Miklagarður er longu latin upp. Størri, nútímansgjørdur og innbjóðandi. 25. oktober í ár verður so øll tann nýggja útbyggingin liðug, har dentur er lagdur á sálina hjá SMS við livandi handilslívi, hugna og mentan.

Nýggja sølumiðstøðin verður sum spildurnýggj við enn fleiri parkeringsplássum og frálíkum umstøðum. Úrvalið av handlum verður munandi breiðari og fevnir um alskyns gerandisvørur, klæðir og skógvar, tøkni, brúkslutir, frítíð, røkt og matarstøð.

Kundi tú hugsað tær at leiga í SMS? Set teg so í samband við Hans Mortensen, stjóra, á telefon 31 30 41 ella 21 23 66.

SMS

Ein býlingur í Havn

SMS - á Trapputrøðni - 100 Tórshavn - Tel 31 30 41 - Fax 31 74 34 - sms@sms.fo - www.sms.fo